# – Nýggi skúlin er ein hent íløga

**Leygardagin kundu kvívíkingar taka tann nýggja skúlan í nýtslu. Hann er liðugur fýra mánaðir fyri tíðina. Nú fara somu menn undir at renovera tann gamla skúlan, og tað arbeiðið verður klárt á jólum – um ikki fyrri!**

SKÚLAVÍGSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Hópur av fólki var komið saman í skúlanum, tá hann varð tikin í nýtslu leygardagin. Á hesum staðnum verða helst fleiri samkomur av ymiskum slagi í framtíðini*

**Kvívík:** Tað var tann 10 ára gamla kvívíksgentan, Halla sum herfyri helt tað vera sera cool at fáa ein nýggjan skúla í Kvívík. Hon gleddi seg serliga til spæliplássið, sum skuldi verða serliga væl útgjørd til børnini at spæla í.

Nú upprann so hesin dagurin, sum bæði børn og vaksin við spenningi hava sæð fram til - grækarismessudag 2005, tá tann nýggi skúlin umsíðir skuldi takast í nýtslu.

Orðið "umsíðir" er kortini als ikki rætt at brúka í hesum samanhanginum, tí í roynd og veru var skúlin liðugur heilar fýra mánaðir fyri tíðina.

Tað var tí ein ikki sørt errin bygdaráðsformaður, Boje Christensen sum leygardagin kundi handa lykilin til tann nýggja skúlan til skúlastjóran, Bjarna Heinesen.

– Eg fari at biðja teg ansa væl eftir skúlanum, so at hann kann halda í mong ættarlið aftrat. Eg haldi, at tað hevur hann fortjent, segði borgarstjórin í takkarrøðu síni leygardagin.

Arbeiðið byrjaði í oktober mánaði 2003 og hevur íalt kostað 17 mió. kr.

### Gjørdu tað øvugta

Nógv fólk var samankomið til samkomuna í skúlanum, - tí tað er jú ikki á hvørjum degi, at ein bygd av slíkari støðd sum Kvívík kann taka ein nýggjan skúla í nýtslu.

Boje Christensen siteraði í røðu síni ein vísan mann, sum hevði sagt, at politikkarar játta meiri pening til fongsul enn til skúlarnar. Hetta gera teir, tí at teir vita, at teir koma aldrin aftur í skúla.

– Men tað gamla bygdaráðið í Kvívík gjørdi tað øvugta. Og tí er tað mær ein stór gleði í dag at kunna taka henda vala bygningin í nýtslu, segði hann.

Arbeiðið uppá skúlan byrjaði fyri sløkum hálvum øðrum ári síðani, og er longu liðugt, hóast ein kjallari eisini varð gjørdur, sum ikki var við í upprunaligu ætlanini.

– Øll sum hava luttikið í arbeiðinum hava gjørt sítt til, at vit nú kunnu taka henda skúlan í brúk fyrr enn ætlað, segði Boje.

### Ein hent íløga

– Tað er sera týdningarmikið fyri okkum, at vit geva børnum okkara tær røttu umstøðurnar til at ogna sær lærdóm. Henda lærdómin, sum er neyðugur til at klára seg best møguligt her í lívinum.

– Tað vóna vit í kommununi, at vit hava gjørt við hesi byggingini, segði Boje Christensen.

Hann legði eisini dent á, at arbeiðið við at menna skúlan í Kvívík ikki var liðugt enn. Nú verður nevniliga farið undir at renovera tann gamla skúlan. Hetta arbeiðið verður liðugt fyri ársskiftið.

– Og eg kann lova tykkum, at tað eru somu menn, sum fara at standa fyri tí arbeiðinum eisini, segði hann.

Bygdaráðsformaðurin vísti á, at tann ljósi og vinarligi bygningurin eisini fer at geva lærarunum tær røttu umstøðurnar at arbeiða undir.

Og so legði hann aftrat:

– Hava lærararnir tær bestu umstøðurnar, fer hetta av sær sjálvum at smitta av uppá undirvísingina, og harvið tann lærdómin, teir skulu geva víðari til næmingarnar.

– Vit mugu ikki gloyma, at ein íløga í ein slíkan bygning er eisini ein íløga í okkara aldurdóm. Vit mugu minnast til, at tann ungdómin sum vit senda út higani, er hann, ið skal vera við til at gjalda okkara eftirløn, segði hann.

Umframt bygdaráðsformannin bóru m.a. eisini mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, skúlastjórin Bjarni Heinesen fram heilsanir, meðan sóknarpresturin í bygdini, Marjun Bæk vígdi skúlan.

Á skránni fyri hátíðarløtuna var eisini kórsangur, tónleikur og gávuhandan. Skúlin fekk m.a. eitt listarverk frá Grækarisi Joensen sjálvum, og sum Hansina Iversen hevur málað, og eitt modell av sluppini "Hjørdis" úr Fuglafirði, sum Immi Dam lat.

**Kvívíkar skúli:**
**Tekning og prosjektering:** Michael Olsen
**Høvuðsenteprisa:** GAJ-Smíð við Grækaris Joensen
**Elarbeiðið:** ID-EL
**Køkur og hurðar:** BSV
**Ventilasjón og HVS:** Maria Poulsen
**Hiti:** Klima FO
**Máláraarbeiðið:** Heini Holm
**Gólv:** Gólvbúni
**Inventar:** Farodane
**Gardinur:** Skálabúðin
**Planering o.tl.:** Hans Wilhelm Lützen
**Betong:** Jóni Djurhuus
**Flísar:** Birgir Krossteig
**Eftirlit:** Uni Patursson
Í skúlanum eru tríggjar vanligar skúlastovur, hølir til fysikk og kemi, skúlakøkur, smíð, salur, lærararúm og skrivstova.
**Kostnaður íalt:** 17 mió. kr.



*Børnini settu sum vera man eisini sín dám á tiltakið*

## 350 úlvar á víkingaferð

**Kvívík:** Eitt av tí, sum teir smáu skótarnir gleða seg til, er tann sonevndi úlvadagurin.

Og nú kunnu teir síggja fram til enn ein slíkan dag, tá KFUM-skótarnir í Kvívík bjóða øllum úlvum úr øllum Føroyum til ein serstakan úlvadag í bygdini.

Hesin dagurin verður í ár hildin 9. apríl, og vænta fyrireikarnir at einir 350 úlvar úr øllum landinum verða við. Á skránni er fleiri kappingar, men tíð er eisini til at hugna sær henda dagin.

Evnið fyri dagin er Víkingar, og er ætlanin at øll skulu fáa eina uppliving av, hvussu teir gomlu víkingarnir búleikaðust.

So er bert eftir at vóna, at veðrið verður teimum til vildar.

**sb.**

## Fyrireika ársmøti í Leguhúsinum

**Nesvík:** Tað er longu langt síðani, at fyrireikingarnar til Ársmøtið hjá Heimamissiónini byrjaðu. Hetta stóra tiltakið verður í Leguhúsinum í Nesvík dagarnar 21. til 24. apríl.

Sagt verður, at eitt slíkt ársmøtið er fyri øll. Á skránni verða alskyns tiltøk, bæði fyri børn, ung og eldri.

Sum nakað nýtt í ár verður skipað fyri áhugatímum og einari sangløtu leygarmorgunin har lovsangsbólkur luttekur.

**sb.**

## Sambýlið bíðar enn

**Strendur:** Tað gongur ikki altíð, sum eitt bygdaráð ætlar: Bygdaráðið í Sjóvar Kommunu hevði ætlað, at eitt sambýli skuldi standa liðugt um eitt ár ella so, men enn er langt á mál.

Áðrenn ein slík bygging kann fara í gongd mugu øll loyvi verða til taks. Tað eru tey ikki enn, tí bíðað verður framvegis eftir svari úr Heilsumálaráðnum um játtan til eitt sambýli.

Kommunan hevur hagani fingið at vita, at svarið neyvan kemur fyrrenn einaferð í heyst. So enn mugu tey gomlu bara geva tol og bíða eina tíð aftrat.

Tekningarnar eru annars klárar, og sambært hesum skuldi pláss verða fyri 13 búfólkum.

**sb.**